Framvegis tætt og spennandi

Í Brøndby halda teir eina av orsøkunum til góða spælið sunnudagin vera, at vøllurin er væl betri, nú tað rætturliga er vorðið vár í Danmark

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tað er framvegis stórur spenningur í superliguni. Brøndby og FCK liggja stavn um stavn, og Esbjerg er í hølunum á teimum. Tað verður millum hesi trý liðini, at kappingin um meistaraskapin fer at standa

Eingin ivi er um, hvat av liðunum, sum kappast um DM, er best fyri í løtuni. Brøndby hevði seint seinnapartin sunnudagin vitjan av AaB. Í góða várveðrinum vóru 20 túsund áskoðarar í Brøndby. Teir sóu góðu gongdina hjá heimaliðnum halda fram. Eftir avhølvingina í fyrsta umfarinum eftir vetrarsteðgin á heimavølli ímóti Esbjerg, hevur Brøndby í seks teimum seinastu dystunum einki mál fingið ímóti sær.

Hesa ferð var álopsspælið hugflogsríkt. Tað gekk skjótt frameftir vøllinum. Sendingarnar vóru neyvar, síðuskiftini nógv, og fleiri av málunum í 4–0 sigrinum vórðu skorað úr heilt lítlari fjarstøðu. AaB sprellaði eitt sindur seinnapartin av fyrra umfarinum. Í síðstu sekundunum fyri steðgin økti Brøndby til 2–0, og seinna umfarið var júst byrjaður, tá ið støðan varð 3–0, og so ráddi bara um hjá AaB at byrgja fyri, at tapið gjørdist ov lemjandi.

Vørumerkið hjá Michael Laudrup hevur altíð verið hugflogsríkt og álopskent spæl. Tí var einki at undrast á, at Brøndby venjarin sunnukvøldið var stak væl nøgdur. Hann hevur fleiri ferðir fyrr í vár vístá – eitt nú eftir landskappingardystin í Esbjerg og steypadystin í Nykøbing Falster – at vallirnir hava verið ov óslættir og tískil ikki nóg góðir til skjótt og neyvt spæl. Nú var vøllurin góður, og venjarin rósti sínum monnum fyri tað, sum teir høvdu avrikað.

Ikki sannførandi

FCK við Toda Jónsson á liðnum og tíggju túsund áskoðarum vann 2–0 í Gladsaxe. Stóri maðurin var nýggja álopsstjørnan Jesper Bech, sum skoraði bæði málini. Tað fyrra legði Todi Jónsson upp til miðskeiðis í 1. hálvleiki, og tað seinna skoraði Jesper Bech, tá ið hann í yvirtíðini smoygdi sær framvið AB málverjanum, áðrenn hann trillaði bóltin í tóma málið.

FCK venjarin, Hans Backe, var ikki nøgdur við avrikið. Eftir venjingina í gjár vildi hann hava at vita frá spælarunum, hví teir bara drivu á í 1. hálvleiki. Hetta hevði við sær, at FCK legan alt seinna umfarið so at siga sat við hjartanum í hálsinum. Tað var um reppið, at AB eftir eitt av heilt fáu álopunum megnaði at javna, áðrenn FCK sigurin í yvirtíðini varð steðfestur.

Í FCK fegnast teir um metið á útivølli. FCK hevur ikki tapt 23 tær seinastu ferðirnar, teir hava verið aðra staðni og spælt – í seytjan landskappingardystum, fýra Europa Cup dystum og tveimum DONG Cup dystum. Tað er ikki so galið, tá ið havt verður í huga, at FCK eitt nú hevur spælt á Mallorca, í Budapest og í Glasgow, umframt at teir hava verið fleiri ferðir í Esbjerg, Brøndby og Odense. Seinasta ferðin FCK tapti á útivølli var Skírisdag í fjør. 17. apríl í 2003 tapti FCK 3–0 í Silkeborg.

OB misti á stokkinum

Góða gongdin hjá OB hevur havt við sær, at tað hevur verið sera torført hjá Jákupi á Borg at vinna sær pláss á besta liðnum. Nú fer tíðin at ganga undan. Síðst í mai verður tíðarskeiðið fyri leiguváttmálanum millum HB og OB liðugt, og í løtuni er tað lítið, sum bendir á, at Jákup á Borg fer at sleppa uppí part á besta liðnum, áðrenn hann aftur flytir til Havnar.

Leygardagin var sera intens og spennandi uppgerð á Odense stadion millum OB og Esbjerg. Úrslitið var 2–2. Tað kundu teir í OB bæði vera nøgdir við og ikki nøgdir við. Teir spældu í 75 minuttir við tíggju monnum, tí ein teirra eftir eitt korter sá reytt orsaka av neyðbremsuni. Við tí veruleikanum í huga var javnleikurin eitt gott úrslit.

Misnøgdin við javnleikin komst av risa møguleikanum, sum teir í yvirtíðini fingu fyri at tryggja sær øll stigini. Liðformaðurin Michael Hemmingsen tók ábyrgdina á seg, tá ið heimaliðið eftir 92 minuttir fekk brotsspark, men Esbjerg málverjin hevði lúrt OB veteranin av, tveitti seg rætta vegin og hálvbjargaði.

Ringur hýrur

Í Árhus vónaðu og roknaðu tey við, at tað fór at ganga rætta vegin, tá ið svenski meistaravenjarin úr Svøríki fekk ábyrgdina av AGF. Men tað hevur bara gingið skeiva vegin. Í seks dystum síðani vetrarsteðgin hevur AGF bara fingið eitt stig. FC Nordsjælland fór úr Árhus við 2–1 sigri. Nú verður aftur tosað um møguleikan fyri, at AGF skal flyta niður. Tað er langt frá meistaradreyminum, sum felagið ætlar sær at gera til veruleikan eitt av næstu árunum. Tí er einki at siga til, at lagið er vánaligt.

Lagið er heldur ikki nakað serligt í Herfølge. Í fýra av teimum seks dystunum, sum teir hava spælt síðani vetrarsteðgin, hevur tað ikki eydnast at skjóta mál. Herfølge vitjaði í Viborg, har heimaliðið ikki hevði vunnið síðani í oktober. Við 2–0 sigri lætti heimaliðið sær heilt burtur frá botnstríðnum.

Herfølge er framvegis omanfyri strikuna, men munurin aftur til Frem minkaði. Í Valby vann Frem 2–1 á FC Midtjylland. Undan hesum dystinum hevði Frem ikki vunnið á heimavølli síðani í oktober, og tað var eisini langt síðani, at FCM síðst vann á útivølli.

Næsta vikuskifti sær skráin soleiðis út: Viborg–Brøndby (leygardagin), AB–Esbjerg, AGF–OB, FCM–FCN, Frem–AaB og FCK–Herfølge.

Bara ein forðing fyri finaluni á Ólavsøku

Um B36 verður annar parturin av steypafinaluni verður neyðugt at gera onkrar broytingar. FSF heldur ikki, at tað er neyðugt at gera nakað, fyrrenn tað er greitt, um talan verður um nakran trupulleika

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen

Nú tað er greitt, hvørji feløgini í fjórðingsfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið eru, er tað eisini greitt, at ein møguligur trupulleiki er burtur. Sambært UEFA skránni verður annar av dystunum í fyrsta innleiðandi umfarinum í UEFA Cup kappingini spælt hósdagin 29. juli, sum er ólavsøkudagur.

Tvey føroysk feløg skulu spæla í UEFA Cup. Annað felagið er B36, sum vann silvur í landskappingini í fjør, og hitt er B68, sum vann bronsu í landskappingini í fjør, og sum slapp upp í part í UEFA Cup, tí B36 vann Løgmanssteypið í fjør.

Eftir at bólkaumfarið er av, er tað greitt, at B68 verður ikki partur av steypafinaluni. Harvið er møguleikin burtur fyri, at toftamenn sama dag bæði skulu spæla á Ólavsøku og í altjóða kapping.

Tað er framvegis møguleiki fyri, at B36 bæði skal spæla steypafinalu og í UEFA Cup á Ólavsøku. Í FSF hava teir leingi verið greiðir yvir henda møguliga trupulleikan. Men teir hava ikki hildið, at tað enn hevur verið neyðugt at gera nakað við hetta.

Eitt er, at tað framvegis er ógreitt, hvørjum B36 skal spæla ímóti í UEFA Cup. Tað lutakastið verður ikki fyrrenn í juni. Eitt annað er tað, at tað ikki er greitt enn, um B36 verður annar parturin av steypafinaluni. Um B36 fer at tapa ímóti VB 8. mai, so verður ikki talan um nakran trupulleika á Ólavsøku. Undir øllum umstøðum verður tað greitt 3. juli, um B36 skal spæla steypafinalu ella ikki.

Um B36 verður partur av steypafinaluni, so er ætlanin at royna at fáa UEFA Cup dystin fluttan nakrar dagar. Um B36 ikki verður partur av steypafinaluni, so er ætlanin at fáa útidystin í UEFA Cup spældan á Ólavsøku.

Um B36 verður annar av pørtunum í steypafinaluni, og um tað ikki fer at eydnast at flyta UEFA Cup dystin, sum sambært skránni skal spælast ólavsøkudag, so verður talan um ein trupulleika, sum skal loystast á annan hátt. Um tað fer at bera við sær, at tað verður neyðugt at flyta steypafinaluna, ber ikki til at siga nakað um enn.

Endiliga glógvaði í

Jann Ingi Petersen og Andrew av Fløtum skoraðu málini, tá ið Fremad Amager vó sigri í Árhus lyfti sær upp um niðurflytingar strikuna

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Eftir at tað leingi hevur ligið illa fyri, gekk tað í vikuskiftinum betri hjá Fremad Amager. Teir vunnu 2-0 í Risvangen í Árhus ímóti FC Aarhus. Bæði málini vórðu skorað í 2. hálvleiki, og í báðum førm vóru føroyingar málskjúttar. Jann Ingi Petersen skoraði stutt eftir steðgin til 1-0, og í yvirtíðini staðfesti Andrew av Fløtum kærkomna sigurin.

Hjalgrím Elttør var ikki á vøllinum í Árhus. Jann Ingi Petersen var ímillum teir fyrstu ellivu. Hann var á vøllinum í 65 minuttir. Andrew av Fløtum varð skiftur inn, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir.

Jann Ingi Petersen setti hol á við góðum skoti úr vinstru. Bólturin tók í stólpan, áðrenn fyrsta málið hjá Jan Inga Petersen fyri Fremad Amager var veruleiki. Í 2. hálvleiki royndi heimaliðið at leggja trýst á Fremad Amager. Tað var eftir skjótálop í yvirtíðini, at Andrew av Fløtum staðfesti sigurin. Tey trý stigini, sum Fremad Amager fekk hesa ferð, hava við sær, at liðið lætti sær upp um niðurflytingarstrikuna. Sunnudagin skal Fremad Amager spæla á heimavølli ímóti B 1913, sum er nógv niðast á støðutalvuni.

Í Vejle stendur ikki væl til. Hesa ferð megnaðu teir 1-1 á útivølli ímóti grannunum í Fredericia. At Fremad Amager fekk fult, meðan Vejle bara fekk eitt stig, hevði við sær, at Vejle, sum hevur so glæsiliga søgu at vísa á, nú er undir strikuni og harvið í stórum vanda fyri at flyta niður í triði bestu deildina. Trý lið skulu niður í 2. deild. Í kappingini at sleppa undan niðurflyting eru umframt B1913, FC Aarhus og Vejle Brønshøj og Fremad Amager og so kanska B93, sum hevur 21 stig. Fremad Amager og Brønshøj hava átjan stig, Vejle hevur seytjan stig, FC Aarhus hevur 14 stig, og B1913 hevur átta stig.

Horsens hevur mist ondina

Meðan kappingin var í vetrarfrí, var Horsens við Johan B. Hansen sannførandi oddalið, sm tóktist hava beina kós ímóti superliguni. Síðani hevur gingið illa. Hesa ferð megnaðu teir bara 1-1 á heimavølli ímóti B93, sum ikki hevur verið sannførandi. Javnleikurin hevði við sær, at Horsens datt niður á triðja plássið.

Silkeborg tykist hava beina kós uppaftur í superliguna. Hesa ferð vunnu teir 2-0 á FC Nordjyllandi. Randers vann torføra útidystin í Køge 3-2. Harvið flutti Randers upp á næstfremsta plássið og er harvið á seinna uppflytingar plássinum. Randers og Horsens hava sama stigatal, men málmunurin hjá Randers er betri, enn hann er hjá Horsens.

Todi varð heilt kløkkur

Eftir at tað fyri stórari viku síðani ikki tóktist sum um, at hann hevði serligar møguleikar, sær tað nú munandi ljósari út hjá Toda Jónsson í FCK

ÚTISETI Í SUPERLIGUNI
Jóannes Hansen

Tað gongur skjótt hvønn vegin í fótbólti. Fyri einari stórari viku síðani var tað lítið og einki, sum bendi á, at Todi Jónsson nú beinanvegin skuldi fáa møguleikan á besta liðnum hjá FCK. Á heimasíðu síni segði hann, at tað vóru fýra frammanfyri hann, sum stríddust um tey bæði álopsplássini.

Sunnudagin var Todi millum teir fyrstu ellivu, tá ið FCK á útivølli í Gladsaxe ikki serliga sannførandi vann 2–0 á botnliðnum AB.

– Eftir venjingina fyrrapartin leygardagin fekk eg at vita, at eg var í fimtan manna hópinum, sum skuldi møta upp sunnudagin. Eg hevði ikki roknað við øðrum, enn at eg skuldi sita á beinkinum, áðrenn eg møguliga slapp eina løtu á vøllin. Tí gjørdist eg ikki sort ovfarin, tá ið venjarin á taktikkfundinum segði, hvussu liðið fór at síggja út.

Sambært danskar fjølmiðlar gingu tað 264 dagar frá tí, at Todi varð skaddur í Valby, har FCK spældi ímóti Frem, og inntil hann aftur fekk møguleikan á besta liðnum.

Mannfall í fremstu rød

Todi mannaði FCK álopið saman við Álvaro Santos. Zuma er vøddaskaddur, og Todi mundi gerast kløkkur, tí ivaleyst hevði hann roknað við, at Peter Møller fór at fáa møguleikan. Hann fekk møguleikan, men tað var ikki fyrrenn í 63. minutti, tá ið Todi var móður og varð tikin út.

Peter Møller spældi ikki alla tíðina. Tá ið tað restaðu tríggir minuttir, noyddist hann av aftur vøllinum, tí hann varð skaddur í fótinum. Hetta hevði við sær, at liðið varð umskipað. Thomas Røll, sum hevur verið skaddur, varð settur inn á miðvøllin í vinstru, og Jesper Bech varð fluttur fram í álopið.

Tað er ikki greitt, um Peter Møller verður tøkur í hálvfinaluni í steypakappingini mikukvøldið, tá ið FCK í fyrru hálvfinaluni fær vitjan av OB. Haraftur- ímóti er tað greitt, at Álvaro Santos ikki verður tøkur, tá ið FCK í vikuskiftinum fer at fáa vitjan av Herfølge. Hann fekk gult kort, og tað hevur leikbann við sær í næsta landskappingardystinum.

Zuma er framvegis skaddur. Tað er eitt sindur óvist, nær hann verður fúrur fyri at spæla aftur. Alt hetta hevur við sær, at Todi Jónsson eftir tíggju døgum er fluttur langt fram í røðini. Eingin ivi tykist vera um, at hann verður í hópinum í annaðkvøld. Um hann verður millum teir fyrstu ellivu valdast eisini um, hvussu heilsustøðan verður hjá kappingarneytunum.

Automatikkurin ikki í lagi

Todi Jónsson var um reppið at fáa mál, tá ið eitt korter var farið. Álvaro Santos spældi frá baklinjuni í høgru og út frá. Todi fekk bóltin einar fimm metrar úr málinum. Kanska lá bólturin eitt sindur aftarlaga, men Todi heldur sjálvur, at hann átti at havt skorað. Tað gjørdi hann ikki, tí málverjin hálvbjargaði í fyrstu atlogu og fekk so fatur á bóltinum.

– Eg hevði ikki roknað við øðrum, enn at eg skuldi sita á beinkinum, áðrenn eg møguliga slapp eina løtu á vøllin, segði Todi Jónsson eftir dystin, sum var hansara fyrsti á FCK-liðnum síðani september mánað í fjør

Miðskeiðis í 1. hálvleiki legði Todi upp til fyrra málið. Jesper Bech, sum í útgangsstøðuni var miðvallari í vinstru, skoraði við góðum fløtum skoti úr seytjan metra fjarstøðu, eftir at Todi Jónsson hevði lagt bóltin upp á tvørs. Lítla løtu seinni stakk føroyski álopsmaðurin bóltin fram ímillum tveir verjuspælarar. Miðvallarin Hjalte Bo Nørregaard gjørdist púra leysur, men skotroyndin var ikki nóg neyv.

Ert tú nøgdur við avrikið?

– Vit spældu toluliga væl í 1. hálvleiki, men tað var ikki sannførandi eftir steðgin. Um vit ikki spæla betri enn hatta, so er ikki hugsningur um, at vit skulu endurvinna meistaraskapin, sjálvt um vit framvegis liggja væl fyri.

Og títt avrik?

– Mær restar dystarvenjing. Hon fæst bara við at spæla í superliguni. Tað, sum eg hugsi um, er automatikkurin í spælinum, tá ið ferðin er høg. Automatikkurin fæst ikki í venjingunum ella í dystum á næstbesta liðnum. Eg hugsi um bóltkensluna, tá ið talan er um temjingar og vendingar og skjótu avgerðina, hvat nú skal gerast. Tað snýr seg um brøkpartar av sekundum. Um eg fái møguleikan at spæla, so fer hetta at betrast.

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1 Brøndby (S)	26	16	-	6	-	4	43	21	22	54
2 FCK (M)	26	16	-	6	-	4	42	21	21	54
3 Esbjerg	26	15	-	8	-	3	55	28	27	53
4 OB	26	14	-	6	-	6	55	37	18	48
5 AaB	26	11	-	7	-	8	39	36	3	40
6 Viborg	26	9	-	8	-	9	39	32	7	35
7 FCM	26	9	-	6	-	11	47	41	6	33
8 AGF	26	8	-	3	-	15	36	54	-18	27
9 Herfølge	26	7	-	5	-	14	24	36	-12	26
10 FC Nordsj.	26	6	-	8	-	12	28	47	-19	26
11 Frem	26	6	-	3	-	17	29	49	-20	21
12 AB	26	5	-	2	-	19	20	55	-35	17

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1 Silkeborg	20	14	-	4	-	2	41	14	27	46
2 Randers FC	20	14	-	2	-	4	53	30	23	44
3 AC Horsens	20	14	-	2	-	4	34	14	20	44
4 HFK Sønderj.	20	12	-	3	-	5	51	26	25	39
5 Køge	20	10	-	5	-	5	38	30	8	35
6 Skjold	20	10	-	3	-	7	42	32	10	33
7 Ølstykke	19	9	-	1	-	9	41	38	3	28
8 Nykøbing	19	8	-	3	-	8	32	32	0	27
9 Fredericia	20	7	-	6	-	7	27	29	-2	27
10 FC Nordjylland	19	7	-	4	-	8	21	28	-7	25
11 B 93	19	5	-	6	-	8	28	32	-4	21
12 Fremad Amager	20	4	-	6	-	10	27	36	-9	18
13 Brønshøj	20	5	-	3	-	12	24	46	-22	18
14 Vejle	20	4	-	5	-	11	27	41	-14	17
15 FC Aarhus	20	4	-	2	-	14	20	47	-27	14
16 B 1913	20	1	-	5	-	14	13	44	-31	8

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

Danska 2. deild

	d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1 Næstved	20	12	-	4	-	4	44	18	26	40
2 Dalum	20	12	-	4	-	4	49	30	19	40
3 HIK	20	10	-	6	-	4	39	31	8	36
4 Holbæk	20	10	-	5	-	5	37	28	9	35
5 Slagelse	20	9	-	4	-	7	37	29	8	31
6 Kolding FC	20	9	-	4	-	7	36	33	3	31
7 B1909	20	9	-	3	-	8	39	31	8	30
8 Jetsmark	19	7	-	6	-	6	29	31	-2	27
9 Brabrand	19	7	-	5	-	7	38	30	8	26
10 Lyngby	20	6	-	7	-	7	33	39	-6	25
11 Kalundborg	20	6	-	5	-	9	42	46	-4	23
12 Holstebro	20	6	-	4	-	10	35	43	-8	22
13 Glostrup	20	6	-	4	-	10	31	39	-8	22
14 Hvidovre	20	5	-	5	-	10	23	40	-17	20
15 Hjørring	20	5	-	3	-	12	24	56	-32	18
16 Skive	20	4	-	3	-	13	33	45	-12	15

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

Bólkur 1

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 B36	6	4	-	2	-	0	20	4	16	14
2 KÍ	6	2	-	4	-	0	15	6	9	10
3 NSÍ	6	2	-	2	-	2	14	12	2	8
4 FSV	6	0	-	0	-	6	4	31	-27	0

Bólkur 2

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 GÍ	6	6	-	0	-	0	12	1	11	18
2 ÍF	6	4	-	0	-	2	19	8	11	12
3 B68	6	1	-	1	-	4	4	9	-5	4
4 TB	6	0	-	1	-	5	5	22	-17	1

Bólkur 3

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 HB	6	5	-	0	-	1	15	8	7	15
2 VB	6	4	-	0	-	2	18	11	7	12
3 EB/S	6	2	-	1	-	3	8	13	-5	7
4 Skála	6	0	-	1	-	5	8	17	-9	1